# Framtíðar fiskivinnan: Skal fisku



**- Tað verður neyvan nakrantíð soleiðis, at allur fiskurin, sum verður veiddur undir Føroyum, verður virkaður umborð á verksmiðjutrolarum, men eg haldi tað vera heilt burtur við av landsins myndugleikum, at teir ikki lata upp fyri hesum møguleikanum, nú so nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum. Tey 50.000 tonsini, sum fara av landinum, høvdu verið nógmikið av ráfiski til 10 skip av støddini sum Skálaberg. Men tað hevði neyvan loyst seg at virkað allan hendan fiskin umborð á dýrum skipum, sigur Hanus Hansen, reiðari og virkisstjóri**

PRÁT
*Vilmund Jacobsen, vilmund@sosialurin.fo*

- Nei, tað er ikki rætt, at eg vænti, at øll okkara fiskaframleiðsla verður umborð á verksmiðjutrolarum í framtíðini.

Hetta sigur Hanus Hansen, stjóri á JFK-Troli og stjóri á P/F Kósini, tá ið vit spyrja hann, um hetta er hansara hugburður.

- Tað ber saktans til at gera útrokningar sum vísa, hvat kann loysa seg at virka umborð – og hvat ikki loysir seg. Hetta avhongur í fyrsta lagi av, hvat fiskur talan er um, og hvussu dýr skipini eru, sum skulu virka fiskin.

Hanus heldur, at tað er ein stórur spurningur, um eitt nú Skálaberg hevði klárað seg undir Føroyum, nú so lítil toskur er at fáa. Upsin er so bíligur, og tí skulu velduga stórar nøgdir til, um hann skuldi verið grundarlagið undir framleiðsluni og lønseminum.

- Eg trúgvi neyvan heldur, at Skálaberg hevði fingið meira upsa undir Føroyum enn tveir av teimum stinnastu partrolarunum fáa, tí teir fáa so nógvan fisk.

## Áhugaverdur tanki

Reiðarin og virkisstjórin heldur tó, at virking umborð er ein áhugaverdur tanki, sum landsstýrið átti at tikið upp, nú so nógv er frammi um dygdina á fiskinum – og ikki minst, nú so nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum.

- Men tað er ivaleyst ikki so skilagott av mær sum virkisstjóra at siga ov nógv um henda spurningin, hóast eg sjálvsagt havi mínar hugsanir um hesi viðurskifti.

Hanus heldur tó, at eitt bíligt verksmiðjuskip hevði havt fleiri møguleikar undir Føroyum, um rætt varð atborið. Hinvegin er ivasamt, hvussu lønsemið hevði verið hjá teimum dýraru skipunum við verandi fiskiskapi og fiskaprísum.

- Men taka vit eitt nú djúpvatnstrolararnar, so fiska teir ymisk fiskasløg, og tað kundi hent, at tann parturin, sum teir fáa av eitt nú kongafiski, toski og hýsu hevði verið við til at lyft uppundir lønsemi, soleiðis at tað kanska kundi verið lønandi at virkað henda fiskin umborð.

Reiðarin og virkisstjórin vísir á, at ein nýggjur flakatrolari sum Skálaberg helst skal fiska fyri einar 60-70 miljónir krónur um árið fyri at bera seg fíggjarliga, og tað letur seg ikki gera við upsaveiðini undir Føroyum sum grundarlagi.

## Stirvin politikkur

- Eg haldi, at framtíðin hjá okkara fiskaídnaði á landi er døpur í løtuni, meðan útlitini hjá veiðiliðnum ikki eru so døpur – tó so, at tað altíð fer at ganga upp og niður við fiskiskapi og fiskaprísum.

Hanus heldur eisini, at okkara fiskivinnupolitikkur er alt ov stirvin.

- Tað er eftir øllum at døma í fínasta lagi, at eitt línuskip, sum fiskar undir Føroyum, fer niður til Skotlands at selja veiðina, tí prísurin har kanska er einar tvær krónur hægri fyri kilo enn her hjá okkum. Samstundis ganga fiskafólk heima í Føroyum við tómum hondum. Maðurin, sum er við skipinum, tjenar nógvan pening, meðan konan, sum bíðar eftir at sleppa til arbeiðis á fiskavirkinum, hevur onga inntøku.

Hann heldur, at málið hjá okkum føroyingum átti at verið, at fiskurin, sum verður veiddur undir Føroyum, antin verður arbeiddur á landi ella umborð - og ikki í so stóran mun sum